


# Arabo við danskar politikarar: Oljuvinna fyllur longu nógv

Deil:

**Jan Müller**

14.08.2014 - 14:23

Oljan.fo

Hóast enn einki lønandi oljufund er gjørt á føroyska landgrunninum, so fyllur olju- og frálandavinnan longu nógv í føroyska samfelagnum. Meira enn 1000 føroyingar eru í løtuni knýttir at hesi vinnu, og talið økist.

Hetta var ein av boðskapunum hjá Ben Arabo, formanni í FOÍB, Føroya Oljuídnaðarbólki og stjóri í Atlantic Petroleum, tá hann greiddi donsku fólkatingslimunum í Føroyanevndini frá um føroyska oljuleiting og oljuvinnu.

Tað er ikki so løgið, at gestirnir høvdu sera stóran áhuga fyri júst hesum partinum av vitjanini, vitandi, at oljufund og inntøkur frá eini oljuvinnu kunnu fáa stóran týdning fyri føroyska búskapin og harvið møguliga eisini koma at broyta framtíðar viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.

Ben Arabo, sum hevur drúgvar royndir í altjóða og føroyskari oljuvinnu, greiddi gestunum frá gongdini á altjóða orkumarknaðinum, leitingini við Føroyar, vaksandi føroysku frálandavinnuni og loksins frá Atlantic Petroleum.










